# Føroyskur umboðsmaður garantur fyri øll arbeiði hjá KB El-Teknik í Føroyum

**Einasta kravið til útlendskar el-fyritøkur at sleppa inn á føroyska marknaðin er, at tær hava ein autoriseraðan el-innleggjara, búsitandi í Føroyum, í starvi hjá sær. Við góðkenning frá SEV fær hesin síðan formligu ábyrgdina av øllum arbeiðum hjá fyritøkuni í landinum. Dømi um hetta er danska fyritøkan KB El-Teknik, við postkassa í Havn, sum hevur vunnið almenn el-arbeiði í Føroyum fyri umleið 30 milliónir krónur á Landssjúkrahúsinum og í Vágatunnlinum**



*Danska fyritøkan KB El-Teknik hevur vunnið útbjóðingina av almennum el-arbeiðum fyri tilsamans 30 milliónir, millum annað í Vágatunnlinum. Ein føroysk deild av fyritøkuni er MVG-skrásett í Føroyum, men danski stjórin í fyritøkuni, sum sambært upplýsingunum hjá Toll&Skatt eigur at búgva í Føroyum, finst ikki í Landsfólkayvirlitinum*

VINNULÍV
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Danska entreprenørfyritøkan KB El-Teknik ger rættuliga um seg á føroyska marknaðinum. Eftir útbjóðingina av tveimum stórum, almennum arbeiðum hevur tað víst seg, at danska fyritøkan, sum hevur heimstað í Jyllandi, hevur verið tann bíligasta. KB El-Teknik stendur í dag bæði fyri el-arbeiðinum í samband við nýbyggingina á Landssjúkrahúsinum og fyri el-arbeiðinum í Vágatunnlinum. Tvey almenn arbeiði, sum fyritøkan í kapping við føroyskar fyritøkur hevur fingið at gera fyri ávíkavist 18 milliónir og 13 milliónir krónur. Umframt hesi bæði stóru arbeiði hevur fyritøkan staðið fyri umfatandi el-arbeiði á virkinum hjá Kollafjord Pelagic.

Fyritøkan KB El-Teknik hevur sum so einki við Føroyar at gera. Fyritøkan er skrásett og hevur sæti í jyska býnum Ry, ikki so langt frá Århus. Á heimasíðu felagsins verður greitt frá ymsum stórum arbeiðum, fyritøkan hevur staðið fyri kring allan heim, millum annað í Eysturevropa, í Mið- og Fjareystri og í Afrika.

Til síni arbeiði í Føroyum hevur fyritøkan stovnað eina nýggja deild, nevnd KB El-Teknik Danmark Deild. Einasta stað, fyritøkan er skrásett í Føroyum, er hjá Toll&Skatt. Føroysk lóggáva sigur nevniliga, at allar útlendskar fyritøkur, sum selja vørur og tænastur, skulu vera MVG-skrásettar í landinum, og hava eitt umboðsfólk í landinum. So er eisini við KB El-Teknik. Í yvirlitinum hjá Toll&Skatt er fyritøkan MVG-skrásett sum eitt einstaklingavirki, ið heldur til í Føroyum. Sum nevnt krevur Toll&Skatt, at fyritøkan skal vera fysiskt til staðar í Føroyum, og hava ein ábyrgdarhavandi í landinum. Hesin persónur er í yvirlitinum hjá Toll&Skatt danski stjórin í KB El-Teknik, Knud Balle, sum sjálvur er skrásettur á eini ávísari adressu í Havn. Sami maður hevur í donsku skrásetingini bústað í Jútlandi í Danmark.

Hóast Knud Balle í upplýsingunum, fyritøka hansara hevur latið Toll&Skatt, boðar frá, at hann býr á eini adressu í Havn, so er maðurin ongantíð fluttur til Føroya. Sjálvt um fyritøka hansara hevur virkað í Føroyum í longri tíð, og eisini hevur bundið seg til arbeiði í eina tíð fram, so finst danski stjórin als ikki í føroyska Landsfólkayvirlitinum, sum skrásetir øll fólk, búsitandi í Føroyum.

## Føroysk løggilding

Fyri yvirhøvur at sleppa at arbeiða við el-installatiónum í Føroyum, skulu allar el-fyritøkur hava eina føroyska løggilding, eina autorisatión. Løggildingin kann bert gevast einum persóni í leiðandi fulltíðarstarvi á fyritøkuni, sum síðan hevur formligu ábyrgdina av øllum arbeiðum hjá viðkomandi fyritøku í landinum. Umframt fleiri faklig krøv, skal persónurin, sum fær løggildingina, hava fastan bústað í Føroyum. Og tað er júst her, at útlendsku fyritøkurnar renna seg í ein trupulleika, í øllum føri á pappírinum.

Trupulleikin er tó ikki størri enn so, at fáa tær ein føroyska løggildan elektrikara í starv hjá sær, í hvussu so er á pappírinum, so ber til at flyta føroysku løggildingina hjá hesum persóni yvir til útlendsku fyritøkuna, sum síðan hevur fría atgongd til at gera øll arbeiði á føroyska marknaðinum. Tí vanligt er, at ein løggilding fevnir um alt landið. Tó eru einstøk virki, t.d. flakavirki, har løggildingin bara er innanhýsis.

Sum nevnt hevur KB El-Teknik í seinastuni verið bíligast í samband við tvey almenn arbeiði í landinum – el-arbeiðið í nýbygginigini á Landssjúkrahúsinum, og el-arbeiðið í Vágatunnlinum.

Og júst hetta seinasta seinasta arbeiðið, sum fyritøkan hevur vunnið, reisir spurningin um gegnið, habilitetin, hjá myndugleikanum, ið gevur løggildingina. Sum nevnt sigur føroysk lóggáva, at tað er SEV, sum gevur løggilding. Men í samband við útbjóðingina av el-arbeiðinum í undirsjóvartunnlinum er stjórin í SEV, sum skrivar undir løggildingina, eisini nevndarformaður í P/F Vágatunnilin, sum sjálvsagt er áhugað í at fáa arbeiðið gjørt so bíliga sum gjørligt. Sjálvur sær Klæmint Weihe tó ongan gegnistrupulleika.

– Hetta málið hevur einki við gegni at gera. Tá ein el-innleggjari uppfyllir ávísar treytir, hevur hann krav uppá at fáa eina løggilding. Hesar treytir lýkur tann, sum hevur løggildingina vegna KB El-Teknik í Føroyum, sigur Klæmint Weihe. Hann vísir á, at føroyski el-inleggjarin frammanundan hevði løggilding, og tá SEV hevði fingið setanarbræv hansara í KB El-Teknik, varð hansara løggilding flutt yvir á føroysku deildina hjá donsku fyritøkuni. Klæmint Weihe leggur afturat, at harumframt er løggildingin galdandi fyri øll arbeiði í Føroyum, og ikki bara fyri el-arbeiðið í Vágatunnlinum. Tá SEV útskrivar eina løggildini, verður ikki kravt at persónurin, sum hevur ábyrgdina av øllum arbeiðum hjá fyritøkuni, skal vera við í dagliga arbeiðinum.

Í báðum almennu arbeiðunum, á Landssjúkrahúsinum og í undirsjóvartunnlinum, sum KB El-Teknik hevur fingið at gjørt í Føroyum, er talan um arbeiði, har stórur vandi kann standast burturúr, verður arbeiðið ikki gjørt á forsvarligan hátt. Og einasta kravið til útlendsku fyritøkuna, sum ger arbeiðið, er, at hon hevur ein løggildan føroyskan el-inleggjara í starvi hjá sær, og sleppur at nýta hansara løggilding. Hóast hetta, so metir Klæmint Weihe ikki, at føroysku krøvini eru ov lin. Tvørturímóti heldur hann, at føroyska skipanin er nøktandi, og vísir á, at sama skipan er galdandi í øðrum londum.

## Í samstarv við føroyskar fyritøkur

Tá el-arbeiðið til undirsjóvartunnilin um Vestmannasund varð boðið út, varð ikki sett sum krav til útlendskar fyritøkur, sum bjóðaðu uppá arbeiðið, at tær skuldu nýta føroyska arbeiðsmegi. Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnilin sigur, at einasta kravið var, at »el-arbeiðið skuldi gerast í samstarv við føroyskar fyritøkur«. Dávid Reinert Hansen sigur, at áðrenn leiðslan tók av nøkrum av tilboðunum, gjørdi hon eina meting av, í hvønn mun tilboðini frá útlendsku fyritøkunum livdu upp til treytirnar um at arbeiðið skuldi gerast »í samstarv við føroyskar fyritøkur«.

– Tá vit tóku av tilboðnum frá KB El-Teknik, varð mett, at fyritøkan livdi upp til hesar treytir, sigur Dávid Reinert Hansen. Hann hevur tó ikki hug at gera viðmerking til, hvørt hann er av somu áskoðan í dag, nú el-arbeiðið í undirsjóvartunnlinum er farið í gongd. Føroyskir el-inleggjarar, Sosialurin hevur tosað við, meta í sínum lagi als ikki, at danska fyritøkan hevur nakað samstarv við teir.



# Umlætting til børn við autismu

**Á býráðsfundi í seinastu viku samtykti Klaksvíkar Býráð at ganga eini umsókn frá umlættingarheiminum, Dáanum, um leigu av læknahúsunum á Garðavegi, á møti. Í góð tvey ár, var Fjálgalon, sum húsið tá kallaðist, karmur um umlætting fyri børn við autismu úr øllum Føroyum**

UMLÆTTING
*Rúna Sivertsen*

Síðani bústovnurin við Mýruveg í Klaksvík læt upp í januar, hava tey foreldur, hvørs børn ikki fingu innivist har, ikki fingið umlætting, sum hóskar børnum við autismu.

Fólk við autismu hava brúk fyri struktureraum lívi við so smáum broytingum í gerandisdegnum sum yvirhøvur gjørligt.

Tí er umráðandi fyri tey at hava eitt umhvørvi, ið er lagað til júst teirra tørv.

Fjálgalon varð í 1999 innrættað og lagað til børn, ið líða av hesi sjúku. Tað var tí eitt stórt afturstig fyri tey, ið ikki eru flutt heiman og enn hava tørv á umlætting, tá Fjálgalon læt aftur.

- Men nú eru tekin komin um, at landsstýrið ætlar at raðfesta serligan tørv høgt. Tí gjørdu vit av, at leiga Dáanum húsini, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

Í skránni fyri almenna býráðsfundin í seinastu viku, sæst, at avgjørt varð, at læknahúsini skuldu nýtast til heilsusystrarnar.

Men tann samtyktin er broytt, tí býráðið metir, at ummlætting til børn við autismu er meir átrokandi.

## Umlætting alneyðug

Kári Lindberg úr Klaksvík, er ein av teimum, sum í fleiri ár stríddist fyri at betra um korini hjá børnum við autismu.

Hann sigur, at tað ikki kann sigast frá, hvussu gott tað er, at møguleiki er hjá foreldrum at børnum við autismu at fáa umlætting til børn síni.

- Hesi børn kunnu ikki yvirlátast til hvønn sum helst og ikki ber til at biðja onnur ansa teimum.

Kári sigur, at í fyrstuni fingu tey umlætting til sonin eina ferð um vikuna.

- Hetta var ein stórur lætti hjá okkum, sigur hann.

Sonurin, Torrey, býr nú á bústovninum fyri børn við autismu við Mýruveg í Klaksvík.

Enn eru fleiri børn í Føroyum við autismu, sum ikki hava fingið innivist á stovni. Onnur eru, sum foreldrini ikki vilja lata á stovn, meðan tey eru smá. Hesi foreldur hava stóran tørv á umlætting.

Tað hevur ikki borið okkum til at fáa upplýst, nær Fjálgalon letur upp aftur, men eftir hvat skilst, verða fundir í næstum um málið.



*Lindberg: Maria og Kári Lindberg við soninum, Torrey. Myndin er tikin í stovuni á umlættingarheiminum, Fjálgulon. Húsið læt aftur í januar í ár. Men nú eru tekin í sól og mána um, at Fjálgalon aftur fer at gerast karmur um umlætting fyri børn við autismu*

# Ferðsluruðuleiki í Hósvík

Nógva hálkan í gjáramorgunin elvdi til veruligan ferðsluruðuleika í Hósvík. Ein trailari hjá Hera Thomsen fór út av vegnum beint við keiøkið, ein bilur hjá OCD fór útav beint við kirkjuna, ein bilur rendi í ein parkeraðan bil, og ein bilur fór av landsvegnum og endaði í bønum.

**-ib**



*Ein trailari hjá Hera Thomsen fór útav vegnum beint við keiøkið í Hósvík í nógvu hálkuni í gjáramorgunin*

*Mynd:Gunnar Hansen*



*Ein bilur rendi á ein parkeraðan bil í brekkuni við Bygarhúsið*
*Mynd:Gunnar Hansen*




*Ein bilur hjá OCD fór eisini útav í Hósvík – beint við kirkjuna*
*Mynd:Gunnar Hansen*



*Ein bilur fór útav landsvegnum og endaði í bønum*

*Mynd:Gunnar Hansen*